## Hinumegin Jørðina

Grønlendska reiðaríið Royal Arctic Line eigur tvey farmaskip, og í løtuni eru heilir 16.000 kilometrar ímillum teirra, skrivar blaðið Sermitsiaq. Annað skipið, Nuka Arctica, er í Maarmorilik í Uummannaq-fjørðinum, har tað skal lossa fyri jól. Hitt skipið, sum eitur Naja Arctica, er harafturímóti suðuri í Suðurhavinum við útgerð til eina rannsóknarstøð á Antarktis. Tey bæði skipini, sum eru 132 metrar long, eru systirskip.



## Heim at halda jól

Íslendska fyritøkan Ístak, sum er væl kend í Føroyum, hevur umleið 300 póllendingar í arbeiði í Íslandi, og í morgun fóru teir við flogfari heim til Póllands at halda jólafrí, skrivar Moergunblaðið. Kolbeinn Kolbeinsson, stjóri hjá Ístak, sigur við blaðið, at allir póllendingarnir, sum arbeiða hjá felagnum, hava valt at fara heim at halda jól. Sáttmálin millum Ístak og póllendingarnar sigur, at arbeiðsgevarin skal tryggja flutning til og úr Íslandi.

Línumenn:

# Góð hýra og nógvir frídagar

**Ein føroyskur línumaður við einum av teimum frægu skipunum tjenar umleið 450.000 krónur um árið og hevur 110 frídagar**

FISKIFLOTI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Sosialinum í gjár sigur formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Jan Højgaard, at neyðugt er við nýhugsan innan føroyska fiskiskipaflotan. Í hesum sambandi nevnir hann, at menn, sum sigla við línubátunum, ikki hava eina skiftisskipan, har teir eru eitt ávíst túratal umborð og síðan hava frítúr.

Jan Højgaard heldur, at tá ið menn ikki hava ein frítúr av og á, verður talið av arbeiðstímum gjøgnum eitt ár rættiliga stórt.

Umborð á føroysku línubátunum ganga menn vanliga seks tímar á vakt og hava síðan frí í seks tímar.

### Hýra og frítíð

Vit hava spurt annan skiparan og eigaran á línuskipinum Klakki, Líggjas Johannesen, hvussu nógvar fiskidagar Klakkur hevur havt í ár.

- Vit hava verið í sjónum umleið 250 dagar og hava fiskað sløk 1100 tons, sum eru seld fyri 16,5 miljónir krónur. Hetta gevur ein manningarpart, sum liggur rundan um 450.000 krónur.

Líggjas sigur, at hann ikki á nakran hátt vil leggja seg út í sáttmálastríðið, men heldur tað vera óheppið, at formaðurin í Føroya Fiskimannafelag at kalla leggur upp til, at føroyskir fiskimenn heldur fara til Noregs at sigla, tí umstøðurnar her heima skulu vera vánaligar.

### Ikki misnøgdir

- Teir, sum sigla við okkum, eru soleiðis heima einar 110 dagar um árið. Vit liggja í miðal einar tríggjar dagar millum túrar, og síðan liggja vit umleið hálvan annan mánaða um summarið. Aftrat hesum liggja vit einar tríggjar vikur um jólaog nýggjárshalguna, sigur Líggjas.

Spurdur, um hann hevur nakra meting av, hvat fiskimenn halda um lýsta verkfallið, sigur skiparin, at tað dugir hann einki at siga um, tí hann hevur ikki tosað við nakran um hetta.

- Eg havi tó ikki skilt, at menn eru serliga misnøgdir við umstøðurnar, sigur hann.

Líggjas vísir á, at oljuútreiðslurnar hjá línuskipunum fara av óbýttum, og tí merkir línuflotin ikki á sama hátt hækkingina í prísunum sum eitt nú trolaraflotin undir Føroyum.

### Góður túrur

Í vikuni landaði línuskipið Klakkur 40.000 pund, sum teir høvdu fingið eftir átta daga roynd á Íslandsrygginum. Ein stórur partur av veiðini var toskur.

Líggjas sigur, at hetta var ein vánaligur túrur í nøgd, men teir seldu væl.

- Vit seldu fyri hálva miljón krónur, sum gevur einar 17.000-18.000 í manningarpart.

Hann vísir á, at teir einans vóru 11 mans við á hesum túri, tí summir av føstu manningini eru farnir í jólafrí.

- Nú fotin er lagdur, missa vit einki tær fyrstu 2-3 vikurnar, tí tá liggur skipið kortini, sigur Líggjas Johannesen.




*- Tað harmar okkum, at formaðurin í Føroya Fiskimannafelag nærmast leggur upp til, at føroyskir fiskimenn heldur fara til Noregs at sigla, sigur Líggjas Johannesen, skipari á línuskipinum Klakki*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Klaksvíkingar hava keypt Báruna




*- Báran eigur nøkur tons undir Íslandi, og tey fer Klakkur væntandi at fiska, sigur Líggjas Johannesen Mynd: Skipalistin*

**Brøðurnir, Líggjas og Bethuel Johannesen í Klaksvík, sum eiga smápartafelagið Undir Klakki, hava keypt snelluskipið Báruna**

SKIPAKEYP

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Snelluskipið Báran er ikki longur heimahoyrandi í Havn. Magnus L. Olsen hevur selt bátin til felagið Sp/f Undir Klakki í Klaksvík. Teir, sum eiga hetta felag, eru brøðurnir, Líggjas og Bethuel Johannesen, ið frammanundan eiga línuskipið Klakk.

Í løtuni stendur Báran á beding í Klaksvík, har ymiskt verður gjørt við skipið.

### Íslandskvota

Líggjas Johannesen sigur, at Báran er ein góður bátur, men nú var neyðugt ymiskum ábótum og viðlíkahaldi.

- Vit hava ikki gjørt okkum nakrar endaligar tankar um, hvat vit fara at brúka bátin til, men í fyrstu syfti hugsa vit ikki um ta stóru driftina.

Hann sigur, at Báran eigur nøkur tons undir Íslandi, sum Klakkur ætlandi fer at fiska, og haraftrat eigur báturin einar 80 fiskidagar undir Føroyum.

### Báran er reyð

- Báran er ikki blá longur. Nú hava vit málað hana okkara lit, so hon er reyð.

Líggjas Johannesen sigur, at tíðin fer at vísa, hvat teir fara at brúka bátin til.

Báran er smíðað úr eik í Danmark í 1968. Hon er 19, 90 metrar long og er merkt 49,16 brt. Maskinan er ein volvo penta 367 hk.